## Ein heilsan til mammu á 85 ára degnum



Í dag – týsdagin 7. februar – fyllir Signhild Johannesen, Signhild á Hædd í Klaksvík 85 ár. Mamma er ættað úr Miðvági. Foreldur hennara vóru Hans Hansen, vanliga róptur Hans í Sibbanum og Elsa Maria Hansen, ættað úr Klaksvík. Elsa Maria var dóttur Mariu og Kollafjarðar-Jógvan. Tey búðu á Stongunum í Klaksvík.

Mamma kom ung til Klaksvíkar at arbeiða og eitt satt konubrot hevur hon altíð verið. Í 1937 fór hon, 22 ára gomul, saman við Alfred Petersen, trúboðara og øðrum yvir í Gomlu Føroyingahavnina at arbeiða á føroyska sjómansheiminum har. Sjómansheimið hjá føroysku sjómansmissiónini í Gomlu Føroyingahavnini varð tikið í nýtslu árið fyri – í 1936. Men mamma gavst ikki eftir einum ári. Hon var eisini í Grønlandi í 1938 og 1939.

Í 1940 giftist hon við Aksel Johannesen, Aksel á Hædd í Klaksvík, og búsettust tey í barnaheimi hansara uppi á Hædd. Pápi okkara doyði í 1978. Mamma hevur sostatt verið einkja í 22 ár. Barnaflokkurin hjá teimum báðum gjørdist stórur. Vit eru 10 systkin sum øll eru á lívi. Elsti sonurin býr í Noreg. Elsta dótturin býr í Fuglafirði. Tvær búgva í Hvannasundi og ein í Norðdepli. Hini fimm systkini búgva í Klaksvík.

Sum nevnt áttu tey bæði – mamma og pápi – 10 børn. Ommubørnini hjá mammu eru 35 í tali og langommubørnini eru 43. Vit sum búgva í Klaksvík og her um leiðir vitja ofta mammu, ommu og langommu okkara, og altíð er hon líka blíð og tekur hjartaliga væl ímóti okkum. Sjálvt hevur hon eisini verið ófør at vitja síni nærmastu. 70 ára føðingardagin helt hon hjá elsta soninum í Noreg. Í 1994 var hon í Bretlandi og vitjaði svigarinnu, sum er gift og búsitandi har.

Sum sagt hevur mamma verið eitt konubrot og eitt arbeiðsgrev hevur hon altíð verið. Hóast hon hevði ein útróðrarmann at passa, og 10 børn í húsinum, við so at siga ongum hentleikum at ráða yvir, so var altíð so skínandi reint og ruddiligt í heiminum. Hvussu ófør og arbeiðsom mamma okkara er, gav at bíta, tá hon nú til seinastu jól hevði bundið øllum 43 langommubørnunum eitt par av hosum í part í jólagávu.

Hóast hon nú í nógv ár hevur verið bæði blind og hølt, so setist hon kortini ikki aftur av hesi orsøk, men leitar sær javnan í dagtilhaldið fyri eldri, eins og hon til fyri stuttum javnan hevur vitja børn og ommubørn, sum búgva heima í Føroyum. Mamma býr framvegis í heiminum, saman við næstelsta soninum, sum er ógiftur. Hon fær heimahjálp tvær ferðir um dagin og klárar seg annars væl.

Góða mamma, vit ynskja tær hjartaliga tillukku við 85 ára degnum og takka tær fyri alt tað tú hevur verið fyri okkum børnini, svigarbørnini, ommubørnini og nú eisini tey mongu langommubørnini. Vit ynskja tær nógv góð ár afturat og eitt gott og blítt lívskvøld.

Harrin styrki teg og vælsigni teg.

**Heilsan Johild**



# Grindamannafundir á Skála og á Sandi

Mikukvøldið, tann 8. mars klokkan 19.30, skipar ”Grindamannafelagið” fyri almennum, upplýsandi fundi um grind í Ítróttarhøllini á Skála, og mánakvøldið tann 13. mars kl 19.30 á Sandi. Nógv er at taka upp og upplýsa um í samband við grind. Vit føroyingar skulu gera okkara grindadráp so góð og fyrimyndarlig, at ongin skal hava nakað at finnast at.

Føroyar eru við í einum felagsskapi, sum eitur NAMMCO, og hesin felagsskapur ger eitt gott og miðvíst arbeiði fyri limalondini. Eitt av endamálunum hjá NAMMCO er at fyrisita allar havsúgdjórastovnarnin í Norðuratlantshavi soleiðis, at veitt verður úr teimum burðardygt, t.v.s. so nógv at stovnarnir alla tíðina eru førir fyri at nøra um sínar egnu stovnar (positivt burðaravlop). Fylgt verður gjølla við gongdini í støddini á hvalastovnunum við regluligum hvalateljingum. Limalondini í NAMMCO hava fingið nógvar ákoyringarnar frá djóraverndarfelagsskapum. Fyri at mótprógva ákoyringarnar, arbeiðir NAMMCO eisini miðvíst á einum vísindaligum støði. Her skulu vit føroyingar bara hugsa um grindakanningarnar upp ígjøgnum 80-ini og 90-ini. Hesar kanningar eru ikki lidnar enn. Ætlanin er at seta fylgisveinasendarar á grindahvalir í summar og so yvir fylgisvein fylgja gongdini hjá ávísum hvalum/bólki. Hesa gongd vita vit alt ov lítið um sum er. Ætlanin er so dagliga at kunna um, hvar teir merktu hvalirnir eru.

Síðsta summar var ein NAMMCO-eygleiðari her og eygleiddi eitt grindadráp. Áðrenn eygleiðarin kemur hevur hann sett seg gjølla inn í lógir og reglugerðir viðvíkjandi grind og grindadrápi, og so er uppgávan at eygleiða okkum føroyingar, um vit gera sum politikkarnir (umsitingin) sigur, at vit skulu gera. Eygleiðarin ger síðani eina frágreiðing til NAMMCO, og haðani frætta so øll limalondini um støðuna viðvíkjandi avlívan av havsúgdjórum í limalondunum Eisini kunnu lond uttanfyri NAMMCO fáa frágreiðingarnar. So áheitanin til allar føroyingar skal tí vera: gerið arbeiðið í grind so væl og samvitskufult, at ongin skal hava nakað at fýlast á. Vit kunnu vænta, at eygleiðarar vera her aftur í summar. Ein góð frágreiðing frá teimum talar okkara søk — eitt gott arbeiðið gevur eina góða frágreiðing, eitt vánaligt avrik eina vánaliga frágreiðing. So lat okkum altíð hugsa um hetta.

Til fundin á Skála mikukvøldið og á Sandi næsta mánakvøld, hevur felagið sett saman eina áhugaverda og fjølbroytta skrá.

Skráin mikukvøldið tann 8. mars á Skála verður hendan:

- Jústines Olsen, djóralækni, kunnar um at drepa grind
- Anna Maria Norby, landmátari frá Landsverkfrøðinginum, greiðir frá botnviðurskiftum á hvalvágunum í økinum (Gøturnar, Fuglafjørður, Funningsfjørður, Sundini og Tjørnuvík)
- Doreta Block greiðir frá grindakanningum og framhaldandi grinda-/hvalakanningum, og hvørjar ætlanir eru í ár
- Kári Thorsteinson, sýslumaður, kunnar um ymiskt í økinum
- Jákup Lamhauge, býráðsformaður í Runavík, ymiskt viðvíkjandi grind serliga við atliti til býtið
- Orðaskiftið

Skráin mánakvøldið tann 13. mars á Sandi verður hendan:

- Jústines Olsen, djóralækni, kunnar um at drepa grind
- Greitt verður frá botnviðurskiftum á hvalvágunum í Sandoynni
- Greitt verður frá grindakanningum og framhaldandi grinda-/hvalakanningum, og hvørjar ætlanir eru í ár
- Ingibjørn Eldevig, sýslumaður, kunnar um ymiskt í økinum
- Fólk á staðnum greiða frá um grind

Fundirnir á Skála og á Sandi eru almennir. Øll eru vælkomin at lýða á og seta fram spurningar, og vónandi verður eitt gott og lívligt orðaskifti á fundinum bæði um lokal mál og úr tí stóra samanhanginum, sum eisini kann birta upp undir eitt víðari prát úti í bygdunum aftaná. Eitt av endamálunum við hesum fundinum er at seta í gongd eitt lokalt prát um grind, seta ungar kreftir við, har teir gomlu mugu geva frá sær. So ein áheitan á øll tey ungu: komið tit eisini við á fundirnar, tí vit eldru og gomlu hava brúk fyri tykkum og vilja fegnir seta ungar kreftir við, læra tykkum upp, so tit eisini kunnu bera henda partin av mentan okkara víðari. Og so mugu vit ikki gloyma alt matvirðið, ið er í eini grind. Hesin matur skal í allar mátar handfarast soleiðis, sum tað sømir seg í einum framkomnum samfelagi.

## Ein tikin við kenning

Løgreglan í Runavík tók ein bilførara fyri at koyra við kenning um vikuskiftið.

Viðkomandi hevði eftir øllum at døma verið í grýludansi í Kambsdali og hevði fingið í meira lagi innanborða.

Av støðini í Runavík frætta vit annars, at vikuskiftið har inni var serstakliga friðarlig í aðrar mátar.

**st**



# Kundarnir hava fingið milliardirnar

*– Bankin hevur ikki fingið eina krónu. Tilvildarligir innlánskundar fingu sína uppsparing bjargaða og samfelagið slapp undan einum sera álvarsligum skrædli, sigur Jørn Astrup Hansen, stjóri í Føroya Banka*

Sveinur Tróndarson

Tað eru nú skjótt átta ár síðani Føroya Banki og Sjóvinnubankin vóru í so sváriari neyð, at teimum tørvaði andahjálp. Upphæddirnar, sum landsstýrið settu í bankarnar vóru ikki smáar, men nú so long tíð er farin hevur tíðin víst, at tað var rætt, at gjalda tær 2.685 mió. krónurnar fyri at bjarga bankunum.

Men bankin er sloppin at hoyra fyri, at hann hevur fingið peningin og tað heldur stjórin verið fullkomiliga burtur úr vón og viti, tí í hansara verð hevur sjálvur bankin ikki fingið eina krónu.

– Í mínari verð hevur landsstýrið bjargað uppsparарum, vinnulívinum og harvið samfelagnum øllum við at skjóta peningin inn í bankan, sigur Jørn Astrup Hansen – Og afturfyri hevur landsstýrið fingið ein banka, sum nú er sera væl fyri. Men vit hava eisini stríðst fyri tí.

– Tey, sum mistu, vóru partaeigararnir — og bara teir, sigur Astrup.

### Almenni bankin

Tann dagin í oktober 1992, tá føroysku myndugleikarnir —mest sum á nátt — vóru boðsendir at koma til Danmarkar á fyrsta sinni í hesum máli, var støðan álvarslig, sera álvarslig. Men tað var hon eisini nakrar fáar mánaðir seinni. Tær 500 milliónirnar, sum vóru settar í Sjóvinnubankan, sum nýggjur partapeningur, í oktober, vóru horvnar, sum døgg fyri sól.

Hóast tað kom sum ein skelkur fyri leiðsluna í bankanum, sum var sett bara nakrar heilt fáar vikur frammanundan, so var bara eitt at gera.

– Vit boðaðu eigarunum frá ein fríggjadag, at fingu vit ikki pening um vikuskiftið, so lat bankin ikki uppaftur mánamorgun. sigur stjórin. – So einføld var støðan.

Bankin fekk peningin. Hann lat tí uppaftur mánamorgun og kundarnir vórðu bjargaðir.

Hetta er bankin — og kanska serliga leiðslan — sloppin at hoyra fyri aftaná.

– Almennur banki er tað heitið, sum vit oftast fáa á okkum, og tað rennur mær kalt niður eftir rygginum tá eg hoyri tað, tí í veruleikanum hevur bankin ikki fingið eina krónu til sín sjálvs. Ikki eina krónu, sigur ein ógvuliga avgjørdur stjóri.

– Hvør einasta króna er farin til skuldina sum bankin hevði, til at bjargað viðskiftafólkunum, sum í hesum føri vóru tilvildarligir innlánarar og ikki minst at bjarga vinnulívinum, sum hevði farið so syngjandi á húsagang, um bankin ikki varð bjargaður, sigur Jørn Astrup Hansen.

### Samanleggingin var røtt

Tá støðan nú verður gjørd upp aftaná — og hugt verður í bakspegli, so er so lætt at vera klókur upp á tað, sum varð gjørt skeivt, men vit kunnu staðfesta, at tað vóru taparar í sambandi við bankabjargingarnar og tað vóru partaeigararnir.

– Teir mistu hvørja krónu, sum teir áttu í bankanum, og teir vóru teir einastu, sum ikki vóru bjargaðir, sigur Astrup.

Tá landsstýrið hevði ognað sær báðar bankarnar var tað næstan ein sjálvfylgja, at teir vóru lagdir saman, tí í nógvum førum var talan um ein sera kostnaðarmiklan dupultrakstur. Báðir bankarnr høvdu tilsamans uml. 70 avgreiðslustøð kring landið og tað sigur seg sjálvt, at tað er ikki uttan kostnað.

– Nú hava vit rationaliserað bankan og gera tað støðugt, fyri at reka hann so bíliga sum gjørligt. Nú eru vit niðri á 25 avgreiðslustøðum. Vit hava nú um 200 starvsfólk móti teimum 400, sum vóru áðrenn, og vit gera stórt sæð tað sama arbeiði, sigur Astrup – Og m. a. tað ger, at vit kunnu halda ein lágan rentumarginal.

Ikki kann sigast annað enn, at tað hevur eydnast til fulnar at reka bankan búskaparliga rættari enn tað varð gjørt undir gomlu skipanini, tí samantalda yvirskot bankans síðani samanleggingina fyri skatt er 1,5 mia. krónur.

– Men tað eydnaðist bara av tí at politikararnir tordu at seta peningin í bankan og seta seg sjálvar uttan fyri ávirkan sigur Astrup – tí tað hava teir nevniliga gjørt. Nevndin og stjórnin i bankanum arbeiðir fullkomiliga uttan ávirkan frá politikarunum.

### Ikki ein almennur kassi

Hóast eigaraviðurskiftini í Føroya Banka eru púra greið, og at talan er um ein banka, sum tað almenna eigur við húð og hár, so leggur stjórin í bankanum dent á, at talan ikki er um ein almennan banka og enn minni, at talan er um ein almennan kassa.

– Tað er ikki upp á tal. Bankin er ein peningastovnur og verður rikin eftir handilsligum treytum. tað merkir, at vit í hvørjum einstøkum føri gera metingar um, hvørt tað er rætt at fara inn í eina verkætlan ella ikki. Vit hyggja ikki at hvat tann politiska síðan sígur, tí tað eru ikki politikararnir, sum hava ábyrgdina av bankanum. Tað hevur nevndin og stjórnin. Vit hava ábyrgdina fyri tí dagliga rakstrinum og hana ætla vit at liva upp til, sigur Jørn Astrup Hansen.

– Pengarnir, sum vóru settir í bankan, vóru settir í fyri at bjarga samfelagnum ísær sjálvum og ikki bara bankanum, og sum sagt hevur sjálvur bankin ikki fingið pengarnar sigur Astrup – tað fingu kundar bankans. Innlánarar og útlánarar. Fingu teir ikki tað so fór samfelagið av knóranum.

Og sambært ársfrágreiðingini, so heldur stjórin í Føroya Banka, at teir, sum hava sett peningin í, hava fingið valuta fyri hann.

– Bankin hevur goldið knappar 150 mió. krónur í skatti og hevur goldið knappar 600 mió. krónur í vinningsbýti og harafturat hevur bankin eina eginogn upp á knappar 1,1 mia. krónur. So tað var rætt at skjóta peningin í bankan, men fyri tað er ikki talan um ein almennan kassa, sigur Jørn Astrup Hansen, sum gleðir seg til tann dag, tá kritikararnir leggja henda óvana frá sær.



*Jørn Astrup Hansen, forstjóri í Føroya Banka*

# Ávarar ímóti trøllabýum í Føroyum

*– Klóraríið um, hvar oljan skal vera, ella ikki, er høpisleyst, sigur formaðurin í Starvsmannafelagnum*

Áki Bertholdsen

–Tað er heilt sjálvsagt fyri mær, at tær inntøkur, vit fara at fáa burtur úr eini møguligari oljuvinnu, skulu koma øllum landinum til góðar.

Tað heldur Gunnleivur Dalsgarð, formaður í Starvsmannafelagnum.

Starvsmannafelagið fylgir gjølla við samfelagsgongdini, og í frágreiðingini, sum formaðurin legði fram á aðalfundinum, kom hann eisini inn á eina komandi oljuvinnu.

Serliga kom hann inn á, hvussu inntøkurnar av eini møguligari oljuvinnu skulu býtast í samfelagnum.

– Í míni verð er alt hetta klóraríið um, hvar oljuvinnan skal vera, ella ikki, heilt høpisleyst. Tí tað er ongin ivi í míni sál um, at inntøkurnar av eini møguligari oljuvinnu skulu koma øllum í landinum til góðar, sigur Gunnleivur Dalsgarð.

Hann sigur, at spurningurin um oljuríkidømið er sera einfaldur: Hetta eru virði, sum allir landsins borgarar eiga, sama, hvar í landinum, teir búgva og tí skulu allir eisini hava ágóðan av tí.

– Men at oljuinntøkurnar so verða brúktar til at menna tey øki í landinum, sum eru ringast fyri, er heilt sjálvsagt fyri mær, leggur hann afturat.

Men Gunnleivur Dalsgarð ávarar eisini ímóti at leypa framav í oljuvinnuni.

– Vit vita, at oljuvinnan varar ikki í allar ævir. Tí mugu vit ansa eftir, at vit ikki leypa framav, soleiðis sum tey hava gjørt nógvastaðni í okkara grannalondum.

–Tað, hann hugsar um, er at nógvastaðni, har oljuvinna hevur tikið seg upp, eru nógvar og stórar íløgur gjørdar fyri at draga oljuvinnuna til ávís øki í landinum.

– Men hesar íløgurnar eru gjørdar uttan fyrilit av økjum, sum vildi „kráma“ til sín.

Og úrslitið gjørdist, at nógv av hesum økjum als ongan lut fingu í „oljuævintýrinum“ Og tí liggja hesar íløgur nú sum óhugnaligir „trøllabýir“

–Slíkt má ikki henda her hjá okkum, sigur Gunnleivur Dalsgarð.

Hann sigur, at tað, sum hann ræðist allarmest, er, at vit fara at gera fyrilitarleysar íløgur kring um í Føroyum við eini oljvinnu fyri eyga.

– Tá kann tað væl henda, at milliónaíløgur koma at standa víða hvør í Føroyum í steindeyðum íløgum.

–Tí hvør kemur at bløða fyri tí, spyr hann

– Og hann svarar sjálvur:

– Tað vera aftur limirnir í Starvsmannafelagnum, sum einaferð enn koma at bløða fyri óundirbygdum íløgum.

– Tað er júst tað, sum vit vit hava bløtt so illa fyri hesi seinastu árini, og tað skal ikki henda seg einaferð enn, sigur Gunnleivur Dalsgarð púra avgjørdur.

Hann sigur, at tað einasta, sum politikararnir skulu gera, er at seta seg niður at viðgera hetta álvarsmál, sum tað sømir seg ístaðin fyri at sita og „klórast“. Tí, tað, sum er fyrifarist, er fyri ein stóran part, politiskar markeringar, har hvør roynir at draga til sín, men tað loysir ikki trupulleikan, sigur Gunnleivur Dalsgarð.

Formaðurin í Starvsmannafelagnum heldur, at gongdin innan tinggátt er rættiliga ódámlig.

– Tað tykist sum um eitt lyndi hevur tikið seg upp til at býta landið sundur í A og B øki.

– Men løgtingslimir eiga at vita, at teir eru valdir til at umboða alt landið. At seta partar í landinum upp ímóti hvørjum øðrum, fer ongantíð at gagna heildini.

Annars vísir formaðurin á, at eftir hansara tykki er Føroyar eitt útjaðaraøki, allar sum tær eru.

– Og uppgávan hjá tinglimunum er at býta samfelagskakuna rættvíst. Men tað gerst ongantíð við at sáa sundurlyndi í fólkinum.

Og so leggur hann spotskliga afturat: Viðhvørt tykist tað, sum um tinggáttin er burtur.

– Men tað var ikki júst tað, sum var grundgevingin fyri teirri stóru lønarhækkingini, sum tinglimir góvu sær sjálvum, sigur Gunnleivur Dalsgarð.



*– Slíkt, sum er hent í oljuvinnuni aðrastaðni, má ikki henda hjá okkum, tí tað ræðist eg allarmest, sigur Gunnleivur Dalsgarð, formaður Starvsmannafelagsins*